# BÝRÁÐSFUNDUR

## Vágs Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 01.06.2015 kl. 19:00 |
| Nevndarlimir:: | Eydis Kjærbo<br>Conrad Gaard Joensen<br>Dánjal Bjarkhamar<br>Heri Hjelm<br>Poul W. Augustinussen<br>Sirið Stenberg<br>Tórður Poulsen |
| Ikki møtt: | Anna Brattaberg Samulesen fráboðað vegna sjúku |
| Nevndarskrivari: | Petry Joensen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 1/15 | 14/00243-15 | Byggiloyvi á matr. nr. 147 og 149 hjá Lars og Helga Larsen | 2 |
| 2/15 | 15/00091-10 | Flyting ml. greinar Vágs skúli - svimjihylurin, seinna viðgerð | 2 |
| 3/15 | 15/00112-2 | Umsókn um marknaumskipa frá Johan Augustinussen matr. nr. 458a og 475a | 3 |
| 4/15 | 15/00147-2 | Umsókn um stuðul til Álandsferð við Johannu summar 2015 | 3 |
| 5/15 | 15/00096-2 | Umsókn frá Johanna TG326 | 4 |
| 6/15 | 15/00116-2 | Vágs Sóknar Bygdasavn søkir um stuðul 2015 | 4 |
| 7/15 | 15/00122-2 | Umsókn um stuðul til Páls-høll fyri 2014 og 2015 | 5 |
| 8/15 | 15/00129-5 | Áheitan um at keypa trukk til Vágs Havn | 5 |
| 9/15 | 15/00144-3 | Roknskapur og protokoll 2014 stuttur samandráttur | 6 |

## 1/15 Byggiloyvi á matr. nr. 147 og 149 hjá Lars og Helga Larsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.05.2015 | 4/15 | 14/00243-15 |
| 2 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 1/15 | 14/00243-15 |

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 13. apríl 2014 umsókn um byggiloyvi og frávik á matr. nr. 147 og 149 í Vági.

Tekniska nevnd er sera positiv fyri hesum og vil um neyðugt leggja málið fyri býráðið at geva frávik frá galdandi byggisamtykt um neyðugt.

Tó hetta, er tað neyðugt fyri Vágs kommunu at móttaka grannaloyvið í samband við hesa bygging, tí bygt verður tættara granna enn loyvt er.

Tekniska deild ger klárt málið viðv. matrikulering og skulu eigararnir eisini undirskriva hesi skjøl.

Tekniska deild hevur 27. apríl 2015 móttikið, grannaloyvi frá Kai Suna Toftum dagfest 4. apríl 2015, og umbøn um marknaumskipan, soleiðis at matr. nr. 149 letur 80 $m^2$ til matr. nr. 147.

**Tekniska nevnd 18. maj 2015:**
Einmælt samtykt at mæla býráðnum til at játta byggiloyvi við fravik.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

## 2/15 Flyting ml. greinar Vágs skúli - svimjihylurin, seinna viðgerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 2/15 | 15/00091-10 |

Á býráðsfundi 27. apríl 2015 var til fyrru viðgerð tilmælið frá Fíggjarnevndini, sum á fundi 20. apríl 2015 samtykt at heita á býráðið um at játta, at flyta 250.000,00 kr. frá grein 4 nr. 410 til grein 5 nr. 570.

Tá fíggjarætlanin fyri 2015 bleiv gjørd, var ætlanin at nýggi hylurin inni á Oyrinum var tikin í nýtslu, tí er eingin játtan avsett í svimjihylinum men alt sett av sum leiguútreiðslur undir Vágs skúla (grein 4 r. stað nr. 410)

Býráðið samtykti einmælt til fyrru viðgerð á fund 27. apríl at játta hetta, málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Einmælt samtykt.

## 3/15 Umsókn um marknaumskipa frá Johan Augustinussen matr. nr. 458a og 475a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.05.2015 | 6/15 | 15/00112-2 |
| 2 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 3/15 | 15/00112-2 |

Vágs kommuna hevur móttikið umsókn um marknaumskipa frá Johan Augustinussen, søkt verður um at matr. nr. 458a letur 6749 $m^2$ til matr. nr. 475a.

**Tekniska nevnd 18. maj 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum. Málið verður lagt fyri býráðið.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Einmælt samtykt.

## 4/15 Umsókn um stuðul til Álandsferð við Johannu summar 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.05.2015 | 2/15 | 15/00147-2 |
| 2 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 4/15 | 15/00147-2 |

Vágs kommuna hevur 19. mai 2015 móttikið umsókn frá Nordisk Kystkultur, Føroya deild, um stuðul til Álandsferð við Johannu TG 326 í juli 2015.
Viðlagt umsóknini er frágreiðing um felagsskapin við endamálsorðing og skrá fyri Álandsferðina, sum verður 5. – 28. Juli 2015.
Vágs kommuna skal verða vertur fyri tiltakinum í 2016, stevna verður tá hildin í døgunum 7. – 10. juli.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2015:**
Samtykt við 2 atkvøðum fyri, at fylgja tilmælinum frá Mentanarnevndini og stuðla við kr. 10.000. Víst verður til, at tiltakið verður í Vági komandi ár.
Eydis Kjærbo atkvøddi ímóti, tí hon metti, at stuðulin skuldi verið kr. 5.000.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Borgarstjórin biður um at fáa tikið mál nr. 15/00147 av aftur skránni. Hetta málið er endaligt avgreitt á fíggjarnevndarfundi 26. mai 2015.

Einmælt samtykt.

## 5/15 Umsókn frá Johanna TG326

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.05.2015 | 4/15 | 15/00096-2 |
| 2 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 5/15 | 15/00096-2 |

Johanna TG 326 søkir um fíggjarliga stuðul fyri árið 2015.

Mentanarnevndin hevur havt málið um stuðul til Johannu TG 326 fyri 18/5.
Nevndin samtykti at stuðla við 60.000,- kr. og beinir málið í FN.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2015:**
Einmælt samtykt, at stuðla við kr. 60.000. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Einmælt samtykt.

## 6/15 Vágs Sóknar Bygdasavn søkir um stuðul 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.05.2015 | 10/15 | 15/00116-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2015 | 3/15 | 15/00116-2 |
| 3 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 6/15 | 15/00116-2 |

Vágs sóknar Bygdasavn søkir um fíggjarligan stuðul til virksemi teirra í 2015. Søkt verður um 72.000,- kr.

**Mentanarnevndin 18. maj 2015:**
Nevndin samtykti at stuðla við 72.000,- kr. Málið veður beint í FN.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2015:**
Samtykt at stuðla við kr. 72.000. Málið verður beint í Býráðið.

Dennis Holm var ikki við í viðgerðini, tí hann metti seg ógegnigan.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Varaborgarstjórin leiddi fundin í hesum málið. Dennis Holm metti seg ógegnigan.
Býráðið heitir á Mentunarnevndina um at taka upp við nevndina um at fáa virkna framsýning í húsið aftur.
Einmælt samtykt at játta stuðulin.

## 7/15 Umsókn um stuðul til Páls-høll fyri 2014 og 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.05.2015 | 18/15 | 15/00122-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2015 | 1/15 | 15/00122-2 |
| 3 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 7/15 | 15/00122-2 |

Felagið Páls Høll søkir um stuðul til Páls høll fyri 2014 og 2015. samb. Pól. T. er talan um 300.000,- kr

**Mentanarnevndin 18. maj 2015:**
Nevndin ynskir at kalla formannin (John Henrik Holm) inn á fund, so greiðar reglur verða viðv. stuðli til Páls Høll.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2015:**
Samtykt at játtað kr. 300.000 í stuðul til sjálvsognarstovnin. Samstundis verður heitt á sjálvsognarstovnin, um at koma við einari umsókn afturat í 2015. Nevndin vil hyggja við vælvild uppá komandi umsókn eisini, sjálvt um tað ikki er sett av til tað á FÆ2015. Málið verður beint í Býráðið. Dennis Holm var ikki við í viðgerðini, tí hann metti seg ógegnigan.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Varaborgarstjórin leiddi fundin í hesum málið. Dennis Holm metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt at játta stuðulin sum settur er av á FÆ2015.

## 8/15 Áheitan um at keypa trukk til Vágs Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 18.05.2015 | 3/15 | 15/00129-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2015 | 9/15 | 15/00129-5 |
| 3 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 8/15 | 15/00129-5 |

Havnameistarin hevur heitt á nevndina um at fáa heimild at keypa ein Trukk til Vágs Havn.
Ein trukkur er í boði fyri 75.000,00 kr. uttan mvg.

**Havnanevndin 18. maj 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, heitt verður á fíggjarnevndina um at játta Havnanevndini at flyta hesa upphædd frá íløgum til rakstur.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2015:**
Einmælt samtykt, at Havnanevndin kann nýta part av íløgujáttanini til keyp av trukki.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

## 9/15 Roknskapur og protokoll 2014 stuttur samandráttur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.05.2015 | 17/15 | 15/00144-3 |
| 2 Vágs Býráð | 01.06.2015 | 9/15 | 15/00144-3 |

Roknskapurin javnvigar við 7,729 mió kr. Lániskuldin við árslok er 44,449, harav skuldin í Hamragarði er 16,6 mió kr, og restin er nýtt lán í Suðuroyar Sparikassa. Nettoskuldin við árslok er 39,3 mió kr.
Í høvuðsheitum kunnu vit siga, at raksturin gjørdist 0,7 mió kr dýrari enn mett, men at tað serliga er meirnýtslan á fleiri av íløgunum, ið gera at úrslitið er verri enn mett í FÆ2014. Rentuútreiðslurnar eru væl hægri, men er hetta av tí, at lánini vóru umløgd. Tíbetur vóru inntøkurnar betur enn mett í FÆ2014.

Í protokollini hevur grannskoðanin serliga viðmerkt, at møgulig meirnýtsla skal hava neyðuga fígging, soleiðis sum lógin ásetur. Annars hevur kommunan í 2014 uppfylt fleiri av gomlu tilmælunum, sum hava staðið í eldri protokollum.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2015:**
Einmælt samtykt, at góðkenna roknskapin og protokollina. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 01. juni 2015:**
Roknskapurin einmælt samtyktur. Og protokoll lisin upp á fundinum.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samulesen | Conrad Gaard Joensen |
| Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm | Poul W. Augustinussen |
| Sirið Stenberg | | Tórður Poulsen |